gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Hava havt eitt ringt ár higartil

**Lemmatrolararnir hava fiskað fyri næstan 15 milliónir minni tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár, enn teir fiskaðu fyri um somu tíð í fjør**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Tað hevur ikki gingið serliga væl hjá teimum føroysku lemmatrolarunum higartil í ár.

Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár, hava djúpvatnstrolararnir, sum teir eisini verða nevndir, fiskað fyri næstan 15 milliónir krónir færri, enn teir fiskaðu fyri í sama tíðarskeiði í fjør.

Ein fyribils uppgerð yvir fiskiskapin hjá lemmatrolaranunum vísir, at fyrsta ársfjórðing í ár, fiskaðu teir fyri góðar 31 milliónir.

Men tað er onki afturímóti tí fiskiskapi, teir høvdu í fyrsta ársfjórðingi í fjør, tí tá fiskaðu teir fyri slakar 46 milliónir. Sostatt er avreiðingarvirðið hjá lemmatrolarunum í ár minkað næstan ein heilan triðing, ella 32%.

Orsøkin til at fíggjarliga úrslitið hjá lemmatrolarunum er so nógv verri í ár, enn tað var í fjør, er, at prísurin á fiskinum, teir hava avreitt í ár, er lækkaður nokk so fitt afturímóti tí, hann var í fjør.



*Í ár eru stórar broytingar hendar í flotanum av lemmatrolarum. Tríggir eru seldir av landinum,ella lagdir og bara ein er komin í flotan ístaðin, men hann er ikki rættililiga komin í fiskiskap enn. Hóast hetta, hava lemmatrolararnir fiskað 300 tons fleiri í fyrsta ársfjórðingi, í ár, enn teir gjørdu í fjør, men kortini er árið nógv verri, tí prísurin er fallin so nógv*

Hinvegin hevur fiskiskapurin verið heldur frægari í fyrsta ársfjórðingi í ár, enn tað var í fjør.

Fyrsta ársfjórðing í ár, fiskaðu teir góð 3.800 tons, men í fjør fiskaðu teir eini 300 tons færri, ella góð 3.500 tons. Talan er sostatt um ein vøkstur í ár upp á 7%.

Men tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár hevur miðalprísurin ikki verið meiri enn 8,17 krónur fyri kilo, í sama tíðarskeiði fjør var hann fast í 13 krónur fyri kilo, ella yvir 4,80 krónur meiri fyri kilo.

Djúpvatnstrolararnir fiska mest av upsa, kongafiski og teimum sløgum, sum eru bólkað undir »onnur fiskasløg«.

Sostatt fiskaðu teir 338 tons av toski í fyrsta ársfjórðingi í fjør, sum teir avreiddu fyri 6,7 milliónir. Men í ár hava teir fiskað eini 100 tons færri, ella 240 tons, sum eru avreidd fyri góðar 4,4 milliónir. Afturat vánaligari fiskiskapi, hevur toskaprísurin í ár verið umleið 1,50 lægri fyri kilo enn hann var í fjør, tí í fjør var hann 19,86 krónur fyri kilo í miðal, men í ár er hann farin niður um 18,50 krónur fyri kilo.

Fiskiskapurin av hýsu er næstan tvífaldaður, úr 186 tonsum í fyrsta ársfjórðingi í fjør, upp í góð 350 tons í sama tíðarskeiði í ár.

Men tíverri fyri teir, er hýsuprísurin kavaður, tí í fjør var hann 13,70 krónur fyri kilo, men í fyrsta ársfjórðingi í ár, hevur hann verið undir 9,50 krónur fyri kilo, tað eru 4,30 krónur - til 4,40 krónur minni, fyri kilo.

Fyrsta ársfjórðing í fjør avreiddu lemmatrolararnir hýsu fyri góðar 2,5 milliónir, men í ár hava teir ikki avreitt hýsu fyri meiri enn góðar 3,3 millión, hóast fiskiskapurin er næstan tvífaldaður.

Annars er fiskiskapurin hjá lemmatrolarunum broyttur heilt fitt. Fyrsta ársfjórðing í fjør, fiskaðu teir 526 tons av upsa, 1.176 tons av kongafiski, og 1.311 tons av øðrum fiskasløgum. Hinvegin vísir fyribilsuppgerðin, at í fyrsta ársfjórðing í ár, hava teir fiskað næstan 1.400 tons av upsa, men færri enn 900 tons av kongafiski og góð 950 tons av øðrum fiskasløgum.

Samstundis eru prísirnir á øllum hesum fiskasløgunum fallin, summi heilt munandi. Fyrsta ársfjórðing í fjør var miðal prísurin á upsa, 5,61 krónur fyri kilo, í ár er hann fallin niður á beint yvir 4 krónur fyri kilo. Kongafiskaprísurin er fallin úr 10,94 krónur fyri kilo, niður í beint yvir 9 krónur, tvs, hann er fallin 1,80- 1,85 krónur fyri kilo. Men serliga nógv er prísurin á »øðrum fiskasløgum fallin« í fjør fingu lemmatrolararnir 15,82 krónur fyri kilo av »øðrum fiskasløgum«, men fyrsta ársfjórðing í ár, hava teir ikki fingið meiri enn góðar 10 krónur, prísurin er sostatt fallin umleið 5,70 krónur fyri kilo.

Í fjør avreiddu lemmatrolararnir upsa fyri 2,948 milliónir (5,6 milliónir í ár), teir avreiddu eisini kongafisk fyri 12,864 millión ( 8,1 millión í ár) og í fjør avreiddu teir eisini onnur fiskasløg fyri 20,744 milliónir (slakar 9,7 milliónir í ár).

| Ár | 2000 | 2001 | Munur |
|---|---|---|---|
| Fiskiskapur | 3.537 tons | 3.800 tons | 7% |
| Avr. virðið | 45,8 mió | 31 mió | -32% |
| Miðalprísur | 12,95 kr. kg | 8,17 kr. kg | -37% |

Annars hevur gongdin hjá djúpvatnstrolarunum verið hendan: Sí talvu niðast í greinini.

### Við fyrivarni

Annars skal viðmerkjast, at hesi hagtølini skulu takast við eitt sindur av fyrivarni, tí tey kunnu vera eitt sindur misvísandi.

Eitt nú er lemmatrolari, Beinta, av Tvøroyri, ikki í fiskiskapi í fyrsta ársfjórðingi í ár, tí hon er seld.

Somuleiðis helt Rasmus Effersøe á Tvøroyri uppat um mánaðarskiftið februarmars, tvs, at hann misti ein mánaða av fyrsta ársfjórðingi í ár, samstundis sum nýggi Rasmus Effersøe ikki rættiliga kom í fiskiskap.

Og at enda kann viðmerkjast, at vágstrolarin, Sancy og fuglafjarðartrolarin, Boðasteinur, mistu ein hálvan mánaða í part av fyrsta ársfjórðingi, tí Sancy er seld av landinum og Boðasteinur varð seldur til Vágs ístaðin.

Somuleiðis siga teir, sum vara av lemmatrolarum, at hjá nógvum av hinum, hevur árið í ár ikki verið verri enn tað var í fjør.

# Hava fiskað 14% meiri í ár enn í fjør

**Sum heild er fiskiskapurin hjá føroyskum skipum, sum fiska botnfisk, batnaður í ár, afturímóti í fjør**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Tað gongur framvegis framá hjá føroysku fiskivinnuni.

Ein fyribils uppgerð, sum er gjørd fyri fiskiskapin tríggjar teir fyrstu mánaðirnar, vísir, at í ár hava føroysk fiskifør, sum fiska botnfisk, fiskað 14% meiri, enn tey fiskaðu um somu tíð í fjør.

Fyrsta ársfjórðing í fjør fiskaðu føroyskir bátar og føroysk skip, sum fiska botnfisk, næstan 26.500 tons tilsamans. Í sama tíðarskeiði í fjør fiskaðu tey 23.223 tons.

Samstundis, sum fiskiskapurin er vaksin, er prísurin eisini hækkaður í ár, afturímóti í fjør. Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár, var avreiðingarvirðið av tí, sum skipini hava fiskað, útvið 348 milliónir. Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í fjør var avreiðingarvirðið beint undir 300 milliónum. Sostatt er avreiðingarvirðið í ár 16% hægri, enn tað var í fjør.

Fyrsta ársfjórðing í ár var miðalprísurin á øllum fiskasløgum 13,14 krónur fyri kilo. Tað er 2% hægri enn í fjør, tá ið hann var 12,92 krónur fyri kilo.

Annars var miðalprísurin á toski 18,58 krónur fyri kilo tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í fjør, men í sama tíðarskeiði í ár er hann fallin eini 25 oyru fyri kilo. Hýsuprísurin er eisini lækkaður nøkur oyru, í fjør var hann 14,84 krónur fyri kilo í miðal, men í ár er hann fallin 75-80 oyru fyri kilo. Somuleiðis er upsaprísurin fallin 80-85 oyru fyri kilo, úr 5,50 krónur fyri kilo í fjør. Mest er prísurin á kongafiski fallin, hann var 10,88 krónur fyri kilo í miðal í fyrsta ársfjórðing í fjør, men í ár er hann 1,65-1,70 krónur lægri í miðal.

Hinvegin er miðalprísurin á øðrum fiskasløgum hækkaður yvir 2, 10 krónur í miðal fyri kilo, úr 16,12 krónur fyri kilo í fjør.

### Gongdin ógvuliga ymisk

Annars vísa tølini, at tað er ógvuliga ymiskt, hvussu gongdin er hjá teimum ymsu bólkunum av skipum og bátum. Í greinini omanfyri vísa vit á, hvussu illa, tað hevur vignast hjá teimum stóru lemmatrolarunum.

Hinvegin vístu vit á í einum blaði herfyri, at útróðrarbátarnir hava havt rættiligan rokfiskiskiskap í ár, tí tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár, hava teir avreitt fyri næstan 60 milliónir meiri, enn teir avreiddu fyri í fyrsta ársfjórðingi í fjør. Serliga hjá teimum minnu útróðrarbátunum undir 15 tons, gekk væl, tí avreiðingarvirðið hjá teimum var heili 155% hægri tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár, enn tað var um somu tíð í fjør.

Annars hevur gongdin hjá útróðrarbátunum tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár, afturímóti í fjør, verið hendan:

| Fiskað<br>Ár 2000 | Fiskað<br>2001 | Avr.virði<br>2000 | Avr.virðið<br>2001 |
|---|---|---|---|
| Yvir 15 tons<br>3.856 t | 5.000 t | 63,6 mió | 91,7 mió |
| Undir 15 tons<br>1.164 t | 2.900 t | 19,5 mió | 49,6 mió |

Hjá partrolarunum og línuskipum hevur munurin ikki verið tann stóri.

Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í fjør fiskaðu partrolararnir 9.832 tons, men í sama tíðarskeiði í ár, hava teir fiskað sløk. 10.200 tons. Tað er ein framgongd upp á 4%.

Hjá teimum hevur at kalla ongin munur verið á prísinum í ár, afturímóti í fjør. Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í fjør, var avreiðingarvirðið hjá partrolarunum sostatt 87,5 milliónir, men í sama tíðarskeiði var tað góðar 91,2 milliónir. Miðalprísurin hjá partrolarunum var 8,90 krónur fyri kilo í fjør, í ár hevur hann verið 8,95 krónur fyri kilo.

Hinvegin var afturgongd hjá línubátunum. Fyrsta ársfjórðing í fjør fiskaðu línubátarnar 3.863 tons og í ár hava teir fiskað 3.600 tons. Fiskiskapurin er sostatt versnaður 6%.

Hinvegin er miðalprísurin kvinkaður eitt vet uppeftir, tí í fjør avreiddu línubátarnar fyri 61,3 milliónir og í ár havua teir avreitt fyri góðar 58 milliónir. Tað er ein afturgongd upp á 5%. Hjá línubátunum var miðalprísurin 15,86 krónur fyri kilo í fyrsta ársfjórðingi í fjør, í sama tíðarskeiði í ár hevur hann verið beint omanfyri 16 krónur fyri kilo.

Hjá garnabátunum hevur eisini gingið eitt sindur framá. Fyrsta ársfjórðing í fjør fiskaðu garnabátarnir 971 tons, sum teir seldu fyri 22, 3 milliónir. Tað gevur ein miðalprís upp á 23,01 krónur fyri kilo.

Í sama tíðarskeiði í ár hava teir fiskað beint omanfyri 1.000 tons, sum teir hava avreitt fyri knappar 27 milliónir. Tað er ein miðalprísur upp á knappar 26 krónur fyri kilo.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Tórbjørn tveitti dana á dyr

**Landsstýrismaðurin í mentamálum tveitti umboðini frá Vestmanna skúla út av fundi um játtan av tímum fríggjadagin. Fyrst tveitti hann álitiskvinnuna á dyr, tí hon var kona ein javnaðarmann, og síðani fekk annar av varaskúlastjórunum boð um at sleppa sær á dyr, tí hon var donsk**



*Tórbjørn Jacobsen gjørdi rættuliga um seg á fundi við lærarar úr Vestmanna fríggjadagin. Millum annað tveitti hann varaskúlastjóran út, tí hon var donsk*

FÓLKASKÚLIN
*John Johannessen*

– Eg havi verið á nógvum fundum gjøgnum lívið, men hetta er ein tann ljótasti, eg havi upplivað.

Hesi orðini eigur Jóannes Fonsdal, skúlastjóri í Vestmanna, eftir ein fund við Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismann við ábyrgdini fyri fólkaskúlan.

Landsstýrismaðurin leikaði sambært skúlastjóranum í sum eitt ørt allan fundin og tveitti fólk, ið honum ikki dámdi, á dyr.

Tórbjørn Jacobsen hevði kallað Vestmanna skúla til fundar, eftir at tey í fjølmiðlunum høvdu víst á, at skúlin hevur fingið ov fáar tímar játtaðar, og at tað var neyðugt at skerja ein tíma av føroyskum, ein av donskum, ein av rokning og ein av kristni hjá hvørjum flokki, fyri at fáa tímatalvuna at hanga saman.

### Ein tíma ov seint

Fundurin skuldi setast klokkan ellivu fríggjamorgunin. Men eingin landsstýrismaður sást fyrr enn klokkan tólv. Lærararnir noyddust tískil at bíða ein heilan tíma, áðrenn teir hittu landsstýrismannin, sum sjálvur hevði kallað inn til fundin.

Tá Tórbjørn Jacobsen so umsíðir setti fundin, var hetta við einum braki. Hann legði fyri við at tveita eitt av lærarumboðunum út av fundinum. Gyðja Hjalmarsdóttir Didriksen er álitisfólk í Vestmanna skúla, og var hon av leiðsluni biðin um at vera við á fundinum. Men Tórbjørn Jacobsen vildi ikki fundast við hana, tí hon er kona Hans Paula Strøm, sum er tingmaður fyri Javnaðarflokkin.

– Eg fundist bert við leiðsluna, vóru boðini frá landsstýrismanninum.

### Dugdi ikki føroyskt

Síðani varð fundast umleið 20 minuttir, til landsstýrismaðurin kom við næsta ógvusliga leikinum. Annar av teimum báðum varaskúlastjórunum í Vestmana skúla kom at nýta eitt danskt orð, tá hon skuldi greiða landsstýrismanninum frá nøkrum viðurskiftum.

Hetta toldi landsstýrismaðurin ikki.

– Tú dugir ikki føroyskt. Far út!, vórðu greiðu boðini frá Tórbjørn Jacobsen. Og tískil mátti Kirsten Simonsen, sum er donsk, men sum hevur prógv í føroyskum og hevur starvast í Føroyum í 17 ár, sleppa sær á dyr.

Hetta var ovboðið fyri leiðsluna í Vestmanna skúla. Tískil reistust øll og fóru av fundinum.

– Tað, sum Tórbjørn Jacobsen gjørdi, var út um alt mark. Hasin maðurin dugir als ikki fundarsið. Slíkur atburður hoyrir ongastaðni heima, sigur Jóannes Fonsdal, skúlastjóri í Vestmanna, og leggur afturat, at hann sjálvur er tjóðveldismaður.

### Kæra

Gjáramorgunin sat lærararáðið í Vestmanna á fundi og viðgjørdi eitt referat frá fundinum við Tórbjørn Jacobsen.

Tá vit tosaðu við Jóannes Fonsdal var fundurin enn ikki liðugur. Men hann kundi tó siga so mikið, sum at lærararáðið ætlar at leggja referatið fyri Lærarafelagið, sum síðani fer víðari við málinum.

Lærarafelagið átalar annars í bløðunum í dag málburðin hjá landsstýrismanninum í viðmerking í Sosialinum í farnu viku um sama mál.

# Eingin viðmerking frá Tjóðveldisflokkinum

**Tjóðveldisflokkurin hevði í gjár ongar viðmerkingar um atburðin hjá Tórbjørn Jacobsen móti lærarunum úr Vestmanna**

FÓLKASKÚLIN
*John Johannessen*

Hóast Sosialurin í gjár avtalaði við Høgna Hoydal, formann Tjóðveldisfloksins, at fáa eina viðmerking um atburðin hjá Tórbjørn Jacobsen móti lærarunum úr Vestmanna, bar hetta ikki til, eftir at Høgni Hoyal hevði lisið greinina.

– Høgni hevur ikki havt tíð at seta seg inn í málið, vóru einastu boðini, vit fingu, og tey komu frá skrivaranum hjá Høgna Hoydal.

Vit avtalaðu eisini við Tórbjørn Jacobsen at fáa eina viðmerking, men tá alt kom til stykkis, var hann ikki at fáa fatur á.

Tilboð summarið 2001
21.05 - 08.09

Mánadag: Buffet
v/ salatborði og ymiskum heitum réttum 165,-
Týsdag: Føroysk buffet
v/ fiski og kjøtspesialitetum 175,-
Mikudag: Buffet
v/ salatborði og ymiskum heitum réttum 155,-
Hósdag: Føroysk buffet
v/ fiski og kjøtspesialitetum 175,-
Fríggjadag: Buffet
v/ salatborði og ymiskum heitum réttum 155,-

Leygardag: 2 rættars matskrá 165,-
Sunnudag: 2 rættars matskrá 155,-

Børn undir 12 ár 1/2 prís

Tilboðini eru galdandi:
Mánadag - fríggjadag
kl. 18.00 - 21.30
Leygardag & sunnudag
kl. 12.00 - 17.00
& 18.00 - 21.30

Matstovan er opin hvønn dag frá
kl. 12.00 - 17.00 & 18.00 - 21.30

Best Western
Hotel Føroyar
Tlf 317500